# Fylla skipið upp á eitt gott samdøgur

*–Fiskiskapurin eftir svartkjafti er góður í løtuni. Skipini royna vestanfyri Írland og tey fylla lastina uppá eitt gott samdøgur*



*Leygardagin kom Gøtutróndur søkkladin á Fuglafjørð at landa til Havsbrún. Mynd: Jonhard Hammer*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað hevur hilnast væl hjá skipunum, sum fiska svartkjaft.

Og tað kemur væl við hjá Havsbrún í Fuglafirði.

Hesa seinastu tíðina hava fleiri bátar verið hjá Havsbrún við svartkjafti og fleiri eru væntandi.

Men mest eru tað Gøtutróndur og Christan í Grótinum, sum hava verið í Fuglafirði.

Seinastu báturin, sum landaði til Havsbrún, var nettupp Gøtutróndur, sum kom søkkladin á Fuglafjørð leygardagin við 2.691 tonsum í lastini.

Somuleiðis er Christian í Grótinum á veg við einum 2.000 tonsum, hann skuldi koma á Fuglafjørð í dag.

Í løtuni er svartkjafturin vestanfyri Írland, einar 400-500 fjórðingar úr landi í Føroyum.

Á Havsbrún vænta teir eisini fleiri útlendskar bátar teir næstu dagarnar, bæði skotskar, og írskir, men eisini íslendskir.

Orsøkin til, at teir koma til Føroya er í fyrsta lagi, at hetta er plássið, sum stytst er at sigla til fyri at sleppa av við lastina.

Tvs, at at tað er stytti at sigla til Skotlands og til Hetlands, men har er bara ein verksmiðja í hvørjum stað, so tað er ofta trupult at sleppa framat.

Men harumframt hevur sjálvandi prísurin og umstøðurnar annars sítt at siga, eitt nú, hvussu skjótt teir sleppa framat at landa og tíðin tað tekur.

Annars eru tað eisini virki í bæði Noregi og Danmark, sum taka ímóti svartkjafti,m men tað er aftur nógv longri at sigla.

Prísurin er góð 50 oyru fyri kilo, og tað er hampiligt. Men prísurin er nógv tengdur at, hvussu feitur svartkjafturin er, og hesa tíðina er hann sera rak.

Á Havsbrún verður svartkjafturin malin til mjøl og lýsi verður úrskilt.

So verður mjøl, lýsi og annað blandað saman og gjørt til fóður, sum so aftur verður ivið alifiski, sum verður seldur í dýrum dómum niðri í Evropa.

Tí eru fuglfirðingar ikki longur so fegnir um, at fiskurin, teir taka ímóti, verður kallaður ídnaðarfiskur.

Teimum dámar fult so væl at kalla hann fóðurfisk.

Og á Havsbrún verur lagt afturat, at hetta er ein framleiðsla sum tað loysir seg at gera burturúr svartkjaftinum.



*Føroya Keypssamtøka í miðbýnum í Havn*

# FK-fundur í Eysturoy

Hetta er árstíðin, tá ið keypssamtøkurnar kring landið halda sínar ársfundir.

Og nú hóskvøldið verður fundurin í Eysturoy og hann verður í Muntra í Fuglafirði klokkan 20 hóskvøldið.

Tað er limafelagið í Eysturoynni, sum skipar fyri fundinum og tað eru sjálvsagt limirnir í FK, sum hava atgongd til fundin.

Limafelagið í Eysturoy umboðar teir báðar FK-handlarnar, tann í Fuglafirði og tann í Saltangará.

Hesi seinastu árini eru hesir limafundirnir bótaðir við áhugaverdum fyrilestrum, sum fakfólk á ymsum økjum hava hildið.

Og soleiðis verður aftur í ár.

Í fundinum í Eysturoynni fer sálarfrøðingurin, Anna Debes Hentze, at halda fyrilestur um „sorg og kreppu“

Í fyrilestrinum fer hon at greiða frá kreppugongdini og um, hvussu ein kann hjálpa fólki, sum eru í sálarligari kreppu.

Tað plagar at vera fitt av fólki á ársfundunum hjá Keypssamtøkunum kring landið, sum samstundis er ett hugnaligt kvøld við einum drekkamunni og einum kakubita afturvið.

Men á ársfundunum verður sjálvsagt greitt frá virkseminum hjá teimum ymsu FK-handlunum.

Umframt felagið í Eysturoynni, eru fýra onnur limafeløg kring landið. Eitt er í Norðoyggjum, eitt í Vágum, eitt í Suðuroy, og so tað í Streymoynni, sum umboðar teir báðar handlarnar í Havn.

# Tað er ongin vandi fyri próvtøkunum

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað skal vilja sera illa til, um arbeiðssteðgurin í fólkaskúlanum fer at nerva próvtøkurnar í summar.

Tað heldur í hvussu so er Hensar Ellingsgaard, sum er deildarstjóri fyri fólkaskúlan í Undirvísingar og Mentamálastýrinum.

Lærarafelagið hevur blokerað arbeiðið í teimum nevndum, sum gera uppgávurnar til próvtøkurnar.

Og eitt nú hava nógv stúrt fyri, at tær ikki fóru at verða lidnar til tíðina, umframt at at heldur ikki fór at eydnast at fáa aðrar fyrireikingar til próvtøkurnar frá hondini.

Men hesum nýtist ongum at stúra fyri, sigur Hensar Ellingsgaard.

Hann sigur, at nevndirnar, sum gera uppgávurnar til próvtøkurnar, vóru lidnar við arbeiðið longu í farna mánaði og uppgávurnar fara nú til prengingar.



*– Uppgávurnar til próvtøkurnar í summar, skuldu vera lidnar longu í februar, og tær fara nú til prentingar, sigur Hensar Ellingsgaard*

Sostatt skuldi ongin orsøk verið tið at stúrt fyri próvtøkunum, sum byrja seinni helvt í mai.

Eitt annað er so tað, at um arbeiðssteðgurin dregur út, so kann tað fara at knípa hjá næmingunum at koma ígjøgnum alt tað, sum er kravt, at tey skulu lesa fyri at sleppa til próvtøku.

Men deildarstjórin fyri fólkaskúlan heldur ikki, at tað er orsøk til at stúra fyri tí enn.

Í øllum førum heldr hann ikki, at hetta er eitt mál, sum Undirvísingar og Mentamálastýrið hevur nakað við at gera, í fyrsta umfari í hvussu so er.

– Tað stendur í lógini, a tað er skúlin og tey, sum hava eftirlitið á staðnum, skúlanevndir og skúlaráð, sum skulu tryggja dygdina í undirvísingini.

– Men dregur arbeiðssteðgurin út, kann tað sjálvandi verða ein trupulleiki.

Hann vísir annars á at børnini hava undirvísingarskyldu.

Men hann heldur ikki, at hendan skyldan er áløgd foreldrunum, nú skúlin ikki megnar at røkja hesa skylduna eina tíð.

– Har skúli er, hvílir hendan ábyrgdin á skúlanum at tryggja, at undirvísingin er ílagi. Tí haldi eg ikki, at vit skulu leggja hesa ábyrgdina á foreldrini her og nú, sigur hann.

Men nú eru tað foreldur, sum hava tikið børnini úr skúlanum.

Tað hava tey gjørt, tí nú so nógvir lærarar hava lagt arbeiðið niður, hevur tað ført við sær, at hava børnini nógvar frítímar ínn ímillum.

Men lærararnir, sum eftir eru, hava ikki umstøður til at taka fulla ábyrgd av øllum hesum børnunum í frítímunum.

Av tí sama eru tað mong, sum ganga fyri vág og vind ein part av degnum.

Og hetta hava nógv foreldur so stóran ampa av, ikki minst har nógv ferðsla er, at tey hava tikið børnini úr skúlanum.

Men hetta heldur Hensar Ellingsgaard er eitt mál ímillum foreldrini og tann lokala skúlamyndugleikan, skúla og skúlanevndir og -ráð

Annars vil Hensar Ellingsgaard ikki gera viðmerkingar til sjálvan arbeiðssteðgin.



# Sær svart út

*– Eg helt semingsuppskotið vera gott og nakað, ið báðir partar kanska kundu góðtaka. Men staðfestast má, at hvørgin parturin tók við semingsuppskotinum, og tí sær svart út. Eftir at Signar á Brúnni um vikuskiftið mestsum gav Lærarafelagnum rætt í krøvum sínum, og tískil tykist ganga ímóti partamanni sínum, fíggjarmálaráðharranum, so metir Signar á Brúnni, at talan er ikki um partapolitikk, men at geva málinum seriøsa viðgerð*

DAGFINN OLSEN

Signar á Brúnni hevur um vikuskiftið verið í loftmiðlum við áskoðan síni um arbeiðssteðgin og ósemjuna millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.Tað løgna við hesum var, at hann tóktist samdur við mongum, ið Lærarafelagið førdi fram og tískil ósamdur við partamanni sínum, Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður við menta- og undirvísingarmálum, metir vera rætt og rímiligt av Føroya Lærarafelag at vísa á øktu arbeiðsbyrðuna, ið nýggja fólkaskúlalógin hevur við sær

**Sigur ikki eitt í dag, og annað í morgin**

Spurdur, um hann við slíkum úttalilsum ikki er bangin fyri at gera støðuna hjá partamanni sínum, fíggjarmálaráðharranum Kartin Hansen, verri, sigur Signar á Brúnni, at hann sigur ikki annað, enn hann altíð hevur sagt og at hetta ikki snýr seg um partapolitikk.

– Eg sigi ikki eitt í dag, og annað í morgin. Eg sigi tað, eg havi sagt alla tíðina. Tá nýggja lógin varð løgd fram fyri løgtingið, sat eg í andstøðu. Í dag siti eg í samgongu, men ein eigur altíð at hava seriøsa viðgerð av málum, sigur Signar á Brúnni.

**Orsøkin til truplu støðuna**

Hóast Signar á Brúnni hevur verið frammi við, at hann heldur Lærarafelagið hava ávísan rætt í krøvum sínum, so sigur hann seg ikki duga at seta neyv tøl á í hesum málinum.

– Longu tá lógin varð løgd fram vísti eg á, at ongar útrokningar vóru gjørdar, ið vístu kostnaðin, ið hon hevði við sær. Lærarafelagið kom tá við útrokningum og sammetingum við Danmark og vísti á útreiðslur upp á einar 80–90 milliónir. Onnur vístu á einar 40 milliónir. Í dag sigur Lærarafelagið einar 18 milliónir í ár. Tá lógin kom fyri løgtingið, fekk tingið at vita, at kostnaðurin var einar 8 - 9 milliónir. Tí er støðan so trupul í dag, vísir Signar á Brúnni á.

**Ikki stríð millum partamenn**

Hann vísir á, at hetta er als ikki tvídráttur millum partamenn, hóast Signar á Brúnni sum landsstýrismaður við skúlamálum hevur úttalað seg og ikki tykist samdur við samráðingarmótpartinum hjá Lærarafelagnum, Karsten Hansen, ið er partamaður hjá Signari.

– Hetta er ikki tvídráttur millum meg og Karsten Hansen, sigur Signar á Brúnni, sum tó vísir á løgnu støðu sína, tí hann hevur einki við sjálvar samráðingarnar at gera, men situr tó eftir sum Svarti Per, tá avleiðingarnar koma.

**Kundu nýtt tíðina betri**

Signar á Brúnni sigur, at hann hevði sagt tað sama, uttan mun til, um fíggjarmálaráðharrin var ein annar og uttan mun til flokk.



*– Hetta snýr seg ikki um partamenn, ella ikki, men um at viðgera eitt mál seriøst. Partarnir mugu seta seg niður og finna útav, hvat tað er, sum er nýtt í lógini og hvat hetta hevur við sær. Eg haldi, at partarnir kundu havt nýtt tíðina betri, sigur Signar á Brúnni.*

– Hetta snýr seg ikki um partamenn, ella ikki, men um at viðgera eitt mál seriøst, sigur Signar á Brúnni, ið væl skilir Karsten Hansen, ið ikki vil geva meira í hækking, enn tey 6,5%, ið onnur feløg hava fingið.

- Men so mugu partarnir seta seg niður og finna útav, hvat tað er, sum er nýtt í lógini og hvat hetta hevur við sær. Eg haldi, at partarnir kundu havt nýtt tíðina betri, sigur Signar á Brúnni.

**Verkfall rakar ósek**

Signar á Brúni metir, at støðan í skúlunum nú er ikki haldgóð, nú arbeiðssteðgur er, og Lærarafelagið umhugsar at herða tiltøkini.

– Verkfall rakar altíð tey óseku. Nú eru tað foreldur og børn og mong øki kring landið eru hart rakt, sigur Signar á Brúnni, sum tí vónar eina skjóta loysn á sáttmálaósemjuni millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarfelag.

**Sær svart út**

Men Signar á Brúnni viðgongur, at tað tykist trupult at fáa partarnar at nærkast hvør øðrum.

Tá semingsmenninir fyri viku síðani komu við sínum uppskoti undir samráðingunum undan arbeiðssteðginum, helt Signar á Brúnni, at teir høvdu gjørt gott avrik og at møguleiki var fyri semju.

– Eg helt semingsuppskotið vera gott og nakað, ið báðir partar kanska kundu góðtaka. Men staðfestast má, at hvørgin parturin tók við semingsuppskotinum, og tí sær svart út. Talan kann óivað gerast um drúgvan arbeiðssteðg, metir Signar á Brúnni.

Samband hevur ikki verið millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, síðani tað brast týskvøldið. Lærarafelagið hevur tó gjørt greitt, at har meta tey, at bólturin liggur hjá Fíggjarmálastýrinum. Semingsmenninir ætla ikki sjálvir at taka stig til samráðingar, men bíða, til partarnir heita á teir.

# Grækarismessa



Ymsastaðni kring landið varð skipað fyri haldið sunnudagin. Hetta var fyrsti sunnudagur í føstu og Grækarismessa. Í kalendaranum sæst eisini nevnd Quadragesima.

Grækarismessa verður vanliga hildin kring landið og tað sigst, at henda dag koma tjøldrini.

Eins og aðrastaðni, varð í Vági skipað fyri Grækarismessuhaldi, ið var við minnisvarðan.

Kirkjukórið Ljómur sang, Dánjal Bjarkhamar helt røðu og skótar luttóku eisini.

Fitt av fólki hevði leitað sær til minnisvarðan hesa løtuna sunnudagin.

*- do -*



*Savnsmynd*

# Dómur fallin

Fyri tíð síðani skrivaðu vit her í blaðnum um mál, har ósemja var millum starvsfólk á eini hárfríðkannarstovu og eigaran av stovuni. Ósemja var um lønarviðurskifti í samband við byrjan av lærusáttmála og starvstíð.

Rætturin hevur nú felt dóm í málinum. Talan er um 3 mál, ið eru lík og Havnar Handverkarafelag hevur verið umboð hjá hárfríðkarunum, ið settu fram endurgjaldskrav mótvegis arbeiðsgevaranum.

Rætturin hevur gjørt av, at eigarin av hárfríðkannarstovuni skal gjalda teimum 3 starvsfólkunum tilsamans 123.013,99 krónur í endurgjaldi. Enn er ikki greitt, um dómurin verður kærdur.

*- do -*